# Uppstilling til nevndarval í Starvsmannafelagnum

Sambært §9 í lógum felagsins verður boðað til uppstilling til nevndarval í Starvsmannafelagnum.

Veljast skulu 2 nevndarlimir og 2 tiltakslimir. Nevndarlimirnir verða valdir fyri 3 ár og tiltakslimirnir fyri 1 ár á aðalfundi felagsins 14. mars 2010. Uppstillingin skal verða liðug innan 1. februar 2010.

Uppstillað verður á tann hátt, at boðað verður skrivstovu felagsins skrivliga frá, at limur sjálvur ynskir at stilla upp, ella at limur ella limir ynskja at stilla annan lim upp. Stillar limur ella stilla limir annan lim upp enn seg sjálvan, skal samtykki valevnisins fylgja við uppstillingarfráboðanini.

Tann skrivliga frásøgnin um uppstilling skal verða skrivstovu felagsins í hendi ikki seinni enn 1. februar 2010. Í frásøgnini skal verða tilskilað navn og bústaður hjá valevninum, og hvar valevni arbeiðir.

Aðalfundurin velur nevndarlimirnar beinleiðis við vanligum meiriluta.

Limir verða, í seinasta lagi tá aðalfundurin verður lýstur, kunnaðir um, hvørji stilla upp til nevndarval verða at velja ímillum á aðalfundinum.

Víst verður annars sum heild til § 9 í felagslógini.

Fráboðanir um uppstilling verða at senda til

**Starvsmannafelagið**
J.H. Schrøtersgøta 9
Postboks 165
110 Tórshavn

# Avloysari fyri vaskifólk í barnsburðarfarloyvi

Søkt verður eftir vaskifólki til Porkeris skúla sum avloysari fyri starvsfólk í barnsburðar – farloyvi at byrja skjótast gjørligt. Starvið er tíðaravmarkað til 18. august 2010.

Arbeiðstíðin er 11 tímar um vikuna.

Løn v.m. sambært sáttmála við Føroya Arbeiðarafelag.

Skrivlig umsókn skal verða kommununi í hendi í seinasta lagi 19. januar 2010.

**Porkeris Kommuna**
**Við Á 8 · FO-950 Porkeri**
**Tlf. 37 36 03 · Fax 37 46 03**
**porkeri@porkeri.fo**

NES KOMMUNA
650 Toftir · www.nes.fo · nes@nes.fo

# Almennir fundir hjá Nes kommunu í 2009

**Fundirnir eru kl. 19.00 í fundarhølinum hesar dagar:**

| | |
|---|---|
| mánadag 25. januar | mánadag 28. juni |
| mánadag 22. februar | mánadag 06. september |
| mánadag 22. mars | mánadag 04. oktober |
| mánadag 26. apríl | mánadag 08. november |
| mánadag 31. mai | mánadag 06. desember |

Mál, sum skulu verða viðgjørd á bygdaráðsfundi, skulu verða kommununi í hendi 14 dagar áðrenn fundin.

**Fíggjarætlanin fyri 2010, og skattalistin fyri 2008 liggja frammi á kommunuskrivstovuni í døgunum frá 05. til 15. januar 2009.**

**NES KOMMUNA**

# fk Matseðil

Hósdagin 7. januar
**Høsnarungabringa / Gjørd hara**

Fríggjadagin 8. januar
**Stoktur medistari / Lasagna / Rullusteik**

Leygardagin 9. januar
**Nakkafillét**

Mánadagin 11. januar
**Fiskafrikadellur / Knettir / Stoktur fiskur**

Týsdagin 12. januar
**Spare ribs / Kálvafrikassé**

Mikudagin 13. januar
**Stoktur fiskur / Kjøtfrikadellur**

*Til ber at keypa døgurða við heim*

**Matstovan í Hoyvík**

# KOYRIKORT? EYSTUROYINGAR

**Nýtt teoriskeið og RF-Skeið byrjar mikudagin 13. januar 2010 kl. 18:00.**

**Tilmelding hjá:**

| | |
|---|---|
| Jari Lykke | 590500 |
| Mikkjal Hansen | 722578 |
| Hugo Kristiansen | 225225 |




**EYSTUROYAR TEORISKÚLI**

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

# Grundskeið í lóg á Fróðskaparsetri Føroya

**Í vár verður væl umtókta Grundskeiðið í lóg aftur á Søgu- og samfelagsdeildini á Fróðskaparsetri Føroya.**

Grundskeið í lóg er partur av samfelagsútbúgvingini á Fróðskaparsetrinum. Skeiðið telur 15 námsstig.

Skeiðið er eisini ætlað fólki, ið ikki eru lógkøn (ikki hava cand. jur. ella líknandi útbúgving) og vilja menna kunnleika sín til løgfrøðiligt háttalag og fáa betri fatan av lógum og juridiskum teksti.

Undirvíst verður tvær ferðir tríggjar tímar aðru hvørja viku, mánadag og mikudag, kl. 10.00 – 13.00.

Skeiðið byrjar mánadagin 8. februar 2010 og endar við eini 4-tímars skrivligari próvtøku mikudagin 26. mai 2010.

Dentur verður lagdur á praktiska almenna fatan av lógkunnleika, serliga at finna og tulka lóg, men í serliga partinum verður hugt nærri at evnum innan stjórnarlóg og fyrisiting.

Fróðskaparsetrið hevur í nøkur ár boðið skeiðið út, og hevur sera stórur áhugi verið fyri tí.

Ábyrgd av skeiðnum hevur Kári á Rógvi PhD lektari í løgfrøði.

Fyri uttansetursfólk (tey, ið ikki lesa á Fróðskaparsetrinum) verður skeiðsgjald kravt, kr. 6.500 fyri skeiðið, íroknað skeiðstilfar og próvtøkugjald.

Umsóknarblað fæst við at venda sær til Søgu- og samfelagsdeildina, J. Broncksgøta 25, 4.h., tlf. 352580. Víst verður eisini til heimasíðuna: www.setur.fo

**Avmarkað luttøka.**

**Umsóknarfreistin er sett til mikudagin 20. januar 2010.**

**FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA**
**Setursskrivstovan · tlf. 35 25 00 · J. C. Svabos gøta 14**
**Postrúm 272 · 110 Tórshavn · www.setur.fo**



# Sunnudagsskúli í Hoyvík

Hvønn sunnudag klokkan 11 er sunnudagsskúli í Hoyvíkar kirkju.

Tú ert eisini vælkomin at verða við.

**Vegna sunnudagsskúlan í Hoyvíkar kirkju**

**Snorri Brend (fartlf. 288233)**